Azzam Melhes:

# Í Jordan valdar friður

**– Í Jordan er tað trygt at vera. Har eru sera nógv flóttafólk, og eg eri ikki bangin um familju mína, sigur Azzam Melhes, sum er jordani, men býr í Føroyum**

MIÐEYSTUR

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Azzam Melhes er jordani, men hevur búð í Føroyum seinastu fimm árini. Hann er júst komin aftur til Føroya frá einari langari summarfrítíð í Amman – høvuðsstaðnum í Jordan – har familja hansara býr.

Azzam Melhes fortelur, at í løtuni streyma fólk úr øllum ættum til Jordan fyri at finna tryggleika:

– Jordan er í løtuni tað tryggasta landið í Miðeystri. Tískil flýggja øll tey, sum hava ráð, til Jordan. Fólk koma bæði úr Libanon, Ísrael og Irak, har tað eisini hevur verið ófriður í fleiri ár.

– Í roynd og veru er alt Jordan eins og eitt uppihaldsstað – ein statión, har øll bara standa og bíða. Eingin ætlar sær at verða verandi í Jordan, men øll miða eftir at sleppa heima aftur sum skjótast. Tey trúgva somuleiðis uppá, at ófriðurin fer at halda uppat beinanvegin.

Hvussu er dagligdagurin hjá jordanum merktur av stríðum?

– Øll eru sjálvandi kedd av støðuni og práta nógv um hana, men tey royna tó at liva, sum tey eru von at gera. Eg eri ikki bangin um familju mína, tí í Jordan er trygt at vera, sigur Azzam Melhes.

Tað kemur týðiliga til sjóndar, at Azzam Melhes er merktur av støðuni í Miðeystri. Tá eg práti við hann, vil hann alt fyri eitt hava at vita, hvat annað vit hava skrivað um støðuna í Miðeystri:

– Flest allir fjølmiðlar eru litaðir og skriva bara tað, sum teir halda er rætt. Eitt nú skriva amerikonsku bløðini bert út frá støðuni hjá ísraelum. Tað eru bert fáir fjølmiðlar, sum veruliga vita, hvussu støðan er í Miðeystri. Ein noyðist at uppliva stríðið frá øllum síðum, greiðir Azzam Melhes frá.

Og hann leggur at enda dent á, at flest allir jordanar stuðla Libanon.



Azzam Malhas prátar beinleiðis til føroyingar:

*– Tað eg vil siga við føroyingar er ikki so nógv. Men fleiri støð, sum mær dámar so væl og havi ein serligan tokka til, eru í dag lagd í oyði. Eg leggi einki í, hvørjar orsøkirnar eru til kríggið. Eg hugsi um børnini og mammur og pápar teirra, sum hvønn dag verða dripin.*

Føroyingar í Ísrael:

## Byrja eina nýggja tilveru í Tel Aviv

Heidi Vinther, sum býr í ísraelska býnum, Maalot, er enn saman við familju sínari í Tel Aviv. Tá Maalot júst varð rakt av rakettálopum frá Hizbollah, helt familjan til í einum bumbuskýli og livdi av dósamati. Men eftir eina viku flýddu tey til Tel Aviv. Har fóru tey at vitja nøkur vinfólk fyri at finna tryggleika. Nú hava tey verið har í nakrar vikur og hava tað gott:

– Tey hava tað framúr í Tel Aviv. Børnini eru sloppin at spæla við í einum orkestri, og Heidi og maðurin hjálpa til við einari legu, sum er í Tel Aviv í hesum døgum. Tey eru so mikið langt suðuri í Ísrael, at har er eingin vandi á ferð, sigur mamma Heidi, Tita Vinther, sum situr heima í Føroyum og fylgir við støðuni hjá dóttrini.

# Reyði Krossur veitir enn meira neyðhjálp

**Fyrradagin gjørdi Reyði Krossur Føroya av at senda enn meira neyðhjálp til Libanon. Higartil hava føroyingar sent 150 túsund krónur til Libanon**

MIÐEYSTUR

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Reyði Krossur Føroya hevur játtað 100 túsund krónur afturat til neyðhjálp í Libanon:

– Á fundi fyrrakvøldið avgjørdu vit at senda 100 túsund krónur afturat, hóast vit enn ikki vita, hvussu nógv er komið inn. So í alt hava vit sent 150 túsund krónur avstað, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi. Hann skoytir uppí, at skriv er sent til landsstýrið um at veita enn meira hjálp til Libanon.

Innkomnu pengarnir eru komnir umvegis tiltøk hjá Reyða Krossi, men somuleiðis hevur felagið fingið sera nógvar peningagávur sendandi.

Lítil ivi er um, at føroyski peningurin kemur væl við í arbeiðinum at fáa lívskorini hjá fólkinum í Libanon á eitt rímiligt støði, men enn vantar nógv í.

Altjóða Reyði Krossur hevur heitt á heimssamfelagið um at játta 475 milliónir tilsamans sum hjálp til íbúgvarnir í Libanon.

– Higartil hava vit í Føroyum sent 150 túsund krónur til Libanon. Lítið er betri enn einki, sigur Suni Vinther.

Peningurin frá Reyða Krossi verður brúktir til at útvega vatn, heilivág, mat, tjald og teppi til tey neyðstøddu í Libanon:

– Umboð frá Reyða Krossi hava verið í øllum býunum, sum liggja við ísraelska markið. Til nú eru um 1000 tons av neyðsynjarvørum bornar út, men nógvar eru ávegis, greiðir Suni Vinther frá.

Higartil hevur Altjóða Reyði Krossur bert boðað frá, at peningur skal sendast til Libanon. Hetta kemst av, at Reyði Krossur í Ísrael sigur seg megna at útvega hjálp til alt Ísrael.







